Danmarks Nationalbank    Havnegade 5    DK-1093 Copenhagen K

Tel +45 33 63 70 00

www.nationalbanken.dk    E-mail: info@nationalbanken.dk

120140_dk

Grafisk tilrettelægning og print: Danmarks Nationalbank

# Føroysku pengaseðlarnir



DANMARKS NATIONALBANK

# Myndevnini framman á seðlunum

Partur av ymsum føroyskum dýrum er høvuðsmyndevnið framman á øllum seðlunum:

Á 50-krónuseðlinum ein veðrur.
Á 100-krónuseðlinum ein toskur.
Á 200-krónuseðlinum ein náttfirvaldur.
Á 500-krónuseðlinum ein fjørukrabbi.
Á 1000-krónuseðlinum ein grágrælingur.

**Tikið eftir ymiskleikum**
Myndevnini eru m.a. tikin eftir tí, at tey eru so ógvuliga ymisk, og tí er lætt at kenna seðlarnar at. Myndevnini eru partur av dýrinum, so seðlarnir eru spennandi og meiri lív er yvir teimum.

**Koparprent**
Høvuðsmyndevnið er koparprent. Tað hevur serskilt listasnið og nógvar smálutir.

**200-krónuseðilin – nýtt virði í Føroyum**
Hetta er fyrstu ferð, at 200-krónuseðilin er í einum føroyskum pengaseðlaraði. At Føroyar fáa 200-krónuseðil er eftir lóg um pengaseðlar o.a. í Føroyum. Í lógini stendur millum annað, at føroysku pengaseðlarnir skulu hava sama virði sum teir donsku pengaseðlarnir.




**Heilmynd**
Heilmyndin sæst á 100-, 200-, 500- og 1000-krónuseðlinum. Heilmyndin skal saman við øðrum trygdum, sum t.d. rútatráði við litskifti og vatnmerkjum gera tað lættari at síggja, um pengaseðilin er ektaður ella falsaður. Myndevnini í heilmyndini hava uppruna sín úr vongunum á kirkjubøarstólunum.






*Støddir:*
*125x72 mm.*
*Komin*
*3. juli í 2001.*






*Støddir:*
*135x72 mm.*
*Komin*
*16. januar*
*í 2003.*






*Støddir:*
*145x72 mm.*
*Komin*
*19. januar*
*í 2004*






*Støddir:*
*155x72 mm.*
*Komin*
*30. november*
*í 2004.*






*Støddir:*
*165x72 mm.*
*Komin*
*15. september*
*í 2005.*

# Myndevnini aftan á seðlunum

Landsløg ymstastaðni í Føroyum eru myndevnið á øllum seðlunum:

Á 50-krónuseðlinum sæst úr Lopranshaga móti Beinisvørði
Á 100-krónuseðlinum sæst Klaksvík
Á 500-krónuseðlinum sæst Tindhólmur
Á 1000-krónuseðlinum sæst út í hav úr Sandoynni.

**Vatnlitamyndir**
Landsløgini aftan á pengaseðlunum eru eftir vatnlitamyndum, sum Zacharias Heinesen (f. í 1936) hevur málað. Hann eigur eisini vatnlitamyndirnar til djóramyndirnar framman á seðlunum. Vatnlitamyndirnar geva flog yvir seðlarnar.

**Ójavnir til longdar**
Seðlarnir eru eins til hæddar, men ójavnir til longdar, 1 cm er á muni millum seðlarnar eftir virði.



**Ymist at vita**
Hvørja ferð ein nýggjur pengaseðil er komin, er faldari sendur í hvørt hús í Føroyum við upplýsingum um myndevnini á seðlinum og um trygd. Faldari er eisini á donskum og á enskum. Upplýsingar um føroysku pengaseðlarnar stendur á www.nationalbanken.dk undir Sedler og mønter.